## Tórður um móta

Móti hevur einki at siga fyri meg, men tá man trínur fram á skíggjan, so er man noyddur at hugsa eitt sindur um, hvørjum man er í. Tíbetur hava vit góð fólk at vegleiða okkum. Men um tað ikki var tað, at eg var í sjónvarpsstovuni av og á, so hevði eg næstan aldri keypt mær nýggj klæði.



## … um politikk

Eg havi stóran áhuga fyri politikki, og eg haldi, at tað er stórt spell, at viðurskiftini við Danmark skulu fylla so nógv í tinginum. Tað tekur ov nógvar kreftir frá politikarunum og skipanini sum heild, sum kundu verið betri nýttar. Tí haldi eg, at tað hevði ongantíð verið ov skjótt at fingið eina endaliga avkláring við Danmark. Sum er, eru viðurskiftini for ullint, og føroyingar ganga í tveimum bólkum. Tað er ikki gott.

# Mr. Føroyskur ítrótt

**Hann var stórur áðrenn hann nakrantíð fekk høvi at síggja ein fótbóltsdyst í bestu deildini. Og hann viðgongur, at hann kanska kostaði einum føroyskum luttakara á oyggjaleikum eina betri plasering, enn hann endaði við at fáa. Hann er mister Føroyskur Ìtróttur, hóast hann aldri sjálvur hevur luttikið á hægsta stigið. Vit hava hitt Tórð Mikkelsen**

## Ítróttarprofilurin



**Eydna Skaale**
blaðkvinna
eydna@sosialurin.fo

*Ìðkaði tú nakran ítrótt, tá tú vart yngri?*
- Eg eri uppvaksin á Toftum, og vit sparkaðu sera nógv. Vit spældu m.a. á ferjuleguni mitt ímillum allar bilarnar, og vit vóru eisini ofta uppi í haganum. Omanfyri Svangaskarð er eitt vallað økið, sum vit kallaðu "á Stovugólvinum", tí har var so slætt, og har eru mangir dystir spældir. Summir dreingir spældu við B68. Eingin vøllur var á Toftum tá, so teir spældu sínar heimadystir í Runavík. Men eg var ongantíð ein av teimum. Eg brúkti nógva tíð at sparka, men bert til stuttleika. Mær dámdi betur at fáast við seyð og ganga á fjall.

*Hvussu var so títt samband við ítróttarheimin, um tú ikki vart knýttur at nøkrum felagi?*
- Fótbóltur var nakað, ið øll tosaðu um. Feðgarnir Niels Juel og Jógvan Arge útvarpaðu frá dystunum, og tað var øgiliga spennandi at fylgja við. Tað vóru serliga HB og KÍ, sum vóru bestu liðini tá, og man kundi livandi ímynda sær hvussu hesir menninir sóu út, og hvussu langt teir kláraðu at sparka. Men man var ikki mobilur á sama hátt tá, sum man er nú, so tað var ikki vanligt at fara at hyggja at dystunum. Eg var tí stórur áðrenn eg fyrstu ferð var til nakran fótbóltsdyst. Men fyrsti dysturin, eg sá, var ein dystur ímillum HB og KÌ í Gundadali. Eg kendi tá øll nøvnini á leikarunum frá útvarpinum.

### Ikki alvitandi

*Hvussu bar tað til, at tú endaði á ítróttarredaktiónini í Svf?*
Tað var í 2002, tá sjónvarpsgjaldið bleiv hækkað, at vit knappliga fingu møguleika at gera meiri burturúr ítróttinum. SVF hevði frammanundan gjørt eitt sindur við ítrótt, m.a. við at senda hond- og flogbóltsfinalur, men ongar fastar sendingar. Og tí eg var ein av teimum, sum javnan hevði eftirlýst meiri ítrótt á skránni, varð eg spurdur um at vera við í ítróttarsendingini. Og tað vildi eg fegin.




*Hvat leggja tit tykkum serliga eftir at senda?*
- Um summarið snúgva sendingarnar seg mest um fótbólt, og um veturin er tað náttúrliga hondbólturin, ið fyllir mest. Men vit hava altíð lagt okkum eftir at taka tær smærru ítróttargreinarnar við eisini. Tað er bara rættiliga torført, tí fólk eru ofta so eiðasør at siga okkum frá, tá nakað er. Tey vilja hava okkum at vera har, men taka bara sum givið, at man veit hvat gongur fyri seg kring landið. Men tá man skal finna útav øllum sum hendir sjálvur, kann tað lættliga gleppa okkurt burturímillum, tíverri. So um fólk vóru raskari at siga okkum frá, hevði tað verið munandi lættari. Men vit royna at dekka tað, sum vit kunnu. Kappróðurin er eisini farin at fylla meiri og meiri um summarið, og tað haldi eg, at fólk hava verið sera fegin um.

### Uttanlandsferðir

*Tú hevur verið fleiri ferðir uttanlands, bæði við fótbóltinum og á oyggjaleikum. Er nakað, ið tú minnist serliga væl?*
- Ja, túrurin í Bosnia við lands-

Sosialurin